# HM í beachvolley



Sandur verður lagdur út á trimum ymiskum støðum í Stavanger, og síðani verður tað nýtt sum beach-volley bani

**Í døgunum 26. juni til 5. juli verður Stavanger vertur fyri heimsmeistara-kappingini í beach-volley**



Her á keiøkinum við Vaagen verður eitt langt borð sett upp, og so kunnu fólk smakka alskyns gastronomiskt góðgæti frá Noregi og stórum parti av verðini

Stavanger skapar karmin um heimsraðar kappingina einaferð um árið, men frá seint í juni og nakað inn í juli verður sjálv HM kappingin í beachvolley hildin í Stavanger.

Trý stór øki mitt inni í býnum verða dýkt undir í sandi, og so verða dystirnir leikir har.

Noregi er eitt av góðu beachvolley londunum, og hava bæði á kvinnu- og harrasíðuni góð pør. Eitt nú gjørdist eitt kvinnuligt par nummar fimm í kappingini í Suðurkorea næst seinasta vikuskifti.

Slíkar beachvolley kappingar verða hildnar nærum hvørt vikuskifti runt um í heiminum, og ítrótturin er eisini við í Olympisku skránni.

Fyrireikingarnar til HM í beach-volley í Stavanger hava verið í eina tíð longu, og í farnu viku var forsetin fyri FIVB (felagsskapurin fyri beachvolley), italiumaðurin, Angelo Squeo, í Stavanger fyri triðju ferð at fylgja við í, hvussu fyrireikingarnar ganga.

Til tess at skapa áhuga fyri kappingini var ætlanin at spæla ein uppvísingardyst uppi á sjálvum Preikestolen, men fylkismaðurin fyri Rogaland forðaði fyri hesum, og tað harmaði Squeo almikið.

Tað er einki at ivast í, at hesar báðar smáu tvær vikurnar verða eitt upplivilsi vert, tí nú ber til at síggja heimsins bestu beachvolley spælarar, sum bert verða ein góðan tíma flúgving burturi.

## Gladmat

Eitt annað og afturvendandi tiltak er matfestivalurin Gladmat, sum á hvørjum ári verður hildin á keiøkinum við Vaagen.

Bestu kokkarnir steikja og kóka mat, sum verður borðreiddur á einum longum borði á keiøkinum. Dentur verður lagdur á mat – sum heitið sigur – og á mentan. Endamálið er at fremja áhugan fyri mati og mentan.

Í ár verður luttakaratalið í Gladmat metstórt. Heilir 115 framsýnarar frá 20 londum verða við, og til ber at smakka pakistanskan brúdleypsmat, etiopiskt gastronomi, franskar sniglar ella asiatiskar rættir, millum mangt annað.

Fyrireikararnir leggja seg serliga eftir at kunna servera altjóða rættir og norskar serrættir í einari góðari blanding.

Gladmat festivalurin verður í døgunum 22. til 25. juli.